

# Eldsløkkjari søkist

Til sløkkiliðsstøðina hjá Tórshavnar kommunu verður søkt eftir sløkkiliðsfólki at arbeiða um dagin á tilkallivakt.

**Arbeiðsuppgávur**
Nakrar av høvuðsuppgávunum eru m.a.
- viðlíkahald av sløkkiútgerð á støðini
- viðlíkahald av brandpostum
- bjargingaruppgávur
- annað vanligt sløkkiliðsarbeiði og hjálparuppgávur
- bilførari á MBF-bussinum
- arbeiði á verkstaðnum

**Førleikakrøv**
Fyrimunur er at vera handverkari, t.d. bilsmiður, maskinsmiður ella tílíkt. Best er eisini at hava førarabræv til akfar yvir 3.500 kg við átekning til vinnuligan fólkaflutning. Um ikki, skal ein hava útvegað sær tað innan tríggjar mánaðir eftir starvssetan. Neyðugt er somuleiðis at hava galdandi prógv í víðkaðari fyrstuhjálp. Annars skal ein hava útvegað sær tað innan eitt ár eftir starvssetan. Ynskiligt er eisini at hava telduførleika á brúkarastigi.

Umsøkjari skal vera likamliga væl fyri, kunna arbeiða sjálvstøðugt og arbeiða væl saman við starvsfeløgum og viðskiftafólki.

**Annað**
Umsøkjari skal útvega reina revsiváttan frá løgregluni. Umsøkjari skal kunna vera á støðini innan fimm minuttir eftir tilkalling.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og lønt eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi á middegi 25. juli 2008. Umsóknir skulu vera merktar „Umsókn sløkkiliðsfólk".

**Meira at vita**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Kartna Jacobsen, sløkkiliðsstjóra, ella Hans Dávid Hansen, varasløkkiliðsstjóra, á tlf. 302100.

SENDISTOVAN

**Tórshavnar kommuna**

Hvønn dag í juli mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan mánadagin 4. august 2008 kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan »Sudoku«.

Vinningur í juli er 2 M-semiflex flogferðaseðlar við Atlantic Airways. Virði Kr. 6.304, -

Drigið verður aðru vikuna í august.

Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.

**Vinnarin av juni kappingini er:**

Kurt Madsen
165 Argir



# SUDOKU

## JULI-KAPPINGIN

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 7 | | 4 | | | 3 | | |
| | | 4 | 1 | | | | 5 | 9 |
| | | | | | 5 | 1 | | |
| | | | | | | 9 | 4 | |
| 5 | 2 | | | | | | 8 | 6 |
| | 4 | 3 | | | | | | |
| | | 2 | 5 | | | | | |
| 6 | 1 | | | | 2 | 5 | | |
| | | 9 | | | 7 | | 2 | |

ATLANTIC AIRWAYS

**Navn:** ______________________

**Bústaður:** ______________________

**Telefon:** ______________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

**Vinningurin í juli**

2 M-semiflex ferðaseðlar frá Atlantic Airways. **Virði Kr. 6.304,-**

Sosialurin